Nashville.fo:

# Føroyskar stjørnur á pall saman við amerikonskum úrmælingum

**Søga verður skrivað, tá Føroya fremstu sangarar fara á pall saman við heimsins bestu tónleikarum í ítrottarhøllini á Hálsi 29. august. Gallakonsertin er endabrestur á Nashville.fo døgum, ið eisini umfata tónleikavinnudag og summarsendingina, „Søgur úr Nashvík“ á Rás 2.**




*Jákup Zachariassen vitjaði í Nashville í 2005 í sambandi við fløguútgávuna "When I'm Dreaming" hjá Ólavi Højgaard. Við síðuna av Jákupi, ið stendur við guitara, er Edgar Struble, ið hevur verið við á so at kalla øllum teimum føroysku innspælingunum í Nashville. Við á myndini eru eisini fleiri av fremstu studio tónleikarunum í USA. Teirra millum Wanda Vick (uttast til vinstru), Brent Mason (næstuttast til vinstru), Tommy White, Kerry Mark, Lonnie Wilson og David Hungate (uttast til høgru)*

TÍÐINDASKRIV

Nú 20 ár eru liðin, síðan fyrstu føroysku tónarnir vórðu innspældir í Nashville í USA, hevur oddamaðurin aftan fyri mongu Nashville-útgávurnar, Jákup Zachariassen, gjørt av at markera samstarvið við tiltakinum Nashville.fo.

Í hesum sambandi koma allar bestu tónleikararnir úr Nashville til Føroya at spæla á gallakonsert saman við føroyingum, ið hava innspælt fløgur í Nashville. Millum føroysku sangararnar teljast Alex Bærentsen, Linda Andrews, Hallur Joensen, Regin Guttesen, Torkil Mørkøre, Kim Hansen, Gunnar Justinussen, Ólavur Højgaard, Magni Christiansen, Sigrid Rasmusen, Bólkurin 4, Lisa Frederiksberg, Svein Askeldsen og Theodor Petersen.

Tað er felagið AEL, American Euro Link, sum Petur H. Jacobsen og Jákup Zachariassen nýliga hava stovnað, sum skipar fyri stóra tiltakinum. Umframt gallakonsertina umfatar Nashville.fo ein tónleikavinnudag og seks summarsendingar á Rás2, ið fáa heitið „Søgur úr Nashvík.“

## Virtuosar og heimstjørnur

"Eg eri ómetaliga fegin um, at tónleikararnir úr Nashville hava játtað at koma til Føroya at luttaka á Nashville.fo. Teir eru allir virtuosar á sínum ljóðføri og spæla dagliga við heimstjørnum," sigur Jákup Zachariassen og sipar til teir átta amerikonsku tónleikararnar, sum koma til Føroya at spæla til Nashville.fo.

Av teimum átta kunnu nevnast Paul Leim, ið er mest brúkti studio trummuspælarin í Nashville. Hann hevur spælt trummur við Shania Twain, Elvis Presley, Peter Cetera, Lionel Ritchie og eini rúgvu av øðrum.

Hin í Føroyum so kendi upprunabassisturin í Toto, David Hungate, vitjar somuleiðis Føroyar á fyrsta sinni. Hungate hevur seinastu 25 árini búð í Nashville, har hann hevur arbeitt við Dolly Parton, Bryan Adams og Olivia Newton-John.

Heimsins kanska allarbesti country guitarspælari, Brent Mason, er eisini við Dream Teammanninginì. Brent Mason er 14 ferðir kosin besti guitarleikari í USA, og ongin guitarleikari í heiminum hevur spælt á fleiri fløgum enn Brent Mason.

Fyri allar steel-guitar entusiastar verður talan um kongavitjan, tá steel guitarspælarin yvir øllum steel guitarspælarum, Paul Franklin, stígur á føroyska jørð. Hann hevur spælt við Sting, Dire Straits, Barbara Streisand, Alan Jackson og mongum øðrum.

Hinir eru eisini allir tónleikarar í toppklassa. John Hobs, Brian Sutton og Edgar Struble.

## Tónleikavinnudagur

Hósdagin 27. august verður skipað fyri einum stórum tónleikavinnudegi. Amerikonsku tónleikararnir fara at hava fyrilestrar og framførslur fyri luttakarunum. Fyrilestrarnir fara at snúgva seg um "The Nashville Sound," hvat krevst fyri at klára seg sum yrkistónleikara og "The Nashville Number system," ið er ein serligur háttur at lesa og skrivað nótar.

Haraftrat fer føroyski produsarin, Óli Poulsen, at framleiða eitt lag saman við tónleikarunum úr Nashville. Ætlanin er at geva luttakarunum innlit í, hvussu ein feskur sangur kann mennast frá fyrstu akkordini á kassaguitara, til hann fullfloygdur drønar gjøgnum hoytalararnar.

Birgir Kruse verður orðstýrari á tónleikavinnudegnum.

## "Søgur úr Nashvík" - útvarp til fólkið

Sum upplegg til gallakonsertina og tónleikavinnudagin fer AEL somuleiðis at framleiða seks summarsendingar fyri Rás 2. Sendingin fær heitið "Søgur úr Nashvík," og fleiri kendar útvarpsrøddir verða at hoyra í sendingini.

Fyrsta sendingin fer av bakkastokki mánamorgunin 6. juli klokkan 11. Nashvík verður ein løtt og upplýsandi sending, har lurtarin í meldrinum millum neytamenn og kópakonur verður undirhildin við samrøðum, varierandi tónleiki, bakgrundstilfari, dagsaktuellum gestum og forkunnugari kapping.

## Avmarkað atgongd

Fyrireikararnir vænta, at gallakonsertin verður ein forkunnug uppliving:

"Eg vænti, hetta verður eitt once-in-a-lifetime upplivilsi hjá fólki. Vit hava roynt at gera konsertina so bíliga og familjuvinarliga sum gjørligt. Atgongumerkið fyri eitt sitipláss er 395 krónur," sigur Jákup Zachariassen.

Avmarkað atgongd er til gallakonsertina 29. august. Talan er um sitikonsert, og pláss er bert fyri 1.300 fólkum. Føroya Tele stendur fyri atgongumerkjasøluni. Atgongumerki kunnu keypast við fartelefon og gjøgnum e-post.

Fyri at keypa við fartelefon, skalt tú hava Føroya Tele hald.

## SMS:

Send NV til 1906, og tú móttekur eini SMS boð við atgongumerkinum.

## Teleshop.fo:

Keyp atgongumerki á teleshop, upplýs, fartelefonnummar ella t-post og tú fært atgongumerkini sendandi tá transaktiónin er framd.

Forsølan byrjar hósmorgunin 25. juni. kl 8.00.

Atgongumerki til tónleikavinnudagin kunnu keypast frá mánadegnum 29. juni í nýggja tónleikahandlinum Soundcheck í Miðlon í Havn.

Sí annars www.nashville.fo